Sverri Hansen, fyrrverandi nevndarformaður í Framtaksgrunninum:

# Latið Fiskavirking fáa frið í nøkur ár

**Tað er eingin góð loysn at privatisera Fiskavirking, nú fyritøkan gongur so væl. Leiðslan og mátin fyritøkan verður rikin uppá kann ikki gerast betri. Tað heldur fyrrverandi nevndarformaður í Framtaksgrunninum, Sverri Hansen, sum í dag er stjóri í Vestnordengrunninum**



*Sverri Hansen, fyrrverandi nevndarformaður í Framtaksgrunninum og í dag stjóri í Vestnordengrunninum er javnan heima í Føroyum í sambandi við láníumsóknir. Hesaferð legði hann eisini leiðina framvið fiskivinnuøkið á Vestaru vág í Havn*

FISKAVIRKING
*Edvard Joensen*

Hóast hann dagliga situr á skrivstovuni í Reykjavík, so er hann framvegis føroyingur við stórum áhuga fyri føroyskum viðurskiftum. Sum stjóri í Vestnordengrunninum er tað eisini hansara ábyrgd at fylgja við, hvat hendir í føroyska samfelagnum og her serstakliga vinnulívinum, sum eisini ger brúk av lánimøguleikunum hjá Vestnordengrunninum. Maðurin vit tosa um er Sverri Hansen, sum sat sum nevndarformaður í Framtaksgrunninum turbolentu árini í 90-unum.

Sjálvur heldur Sverri Hansen, at føroyingar í dag hava eitt hava eitt væl konsoliderað og professionelt vinnulív. Hevur man tol og vil geva fleiri av verkætlanunum frið at menna seg, so er ein góð framtíð fyri framman heldur hann. Men skal man hava nógv orðaskifti um fyritøkurnar, so er tað nakað, sum troyttar og darvar bæði leiðslur og virki. Her sipar hann ikki minst til orðaskiftið, sum hevur verið um Fiskavirking.

– Sjálvandi skal tú vera opin fyri einum tjaki í einum samfelag, men tað er spurningurin, hvussu tú fær eitt konsturktivt tjak og kann fáa tað ment soleiðis, at tað er styrkjandi fyri fyritøkurnar heldur enn, at tað skal skapa ótryggleika.

Hvat heldur Sverri Hansen tá um Fiskavirking og tjakið um at fáa tað selt!

– Eg haldi, at tað hevði verið mest náttúrligt at latið fyritøkuna fingið frið og latið hana sloppið at ment seg enn meira. Vit mugu minnast til, at hon var ógvuliga slitin tøkniliga sæð, og tað tekur sína tíð at uppgradera hana. Eg trúgvi at gevur man tol og bíðar, so fær tú eina fyri Føroyar betri fyritøku.

Hann heldur ikki, at vit fáa eina betri loysn við Fiskavirking við at priva-tisera fyritøkuna. Leiðslan og mátin fyritøkan verður rikin uppá kann ikki gerast betri.

Uppá fyrispurning um tað ikki er óheppið, um føroyingar fáa eitt vinnulív, sum verður at líkast Royal Greenland modellinum, har tað er tað almenna, sum eigur og rekur vinnutólini sigur Sverre Hansen, at í prinsippinum er eitt skott millum Framtaksgrunnin og politikararnar. Samanborið við t.d Grønland er Fiskavirking langt frá tí t.d. Royal Greenland stendur fyri. Fiskavirking er ein stórfyritøka í Føroyum men langt frá ein monopolfyritøka.

Sum búskaparfrøðingur hevur Sverri Hansen eisini stóran áhuga fyri tí politiska orðaskiftinum í Europa, har verður lagt upp til, at alt skal vera so liberalt. Sjálvur heldur hann, at man hinvegin eisini kann reka fyritøkur í einum samfelag við eini blandingsbúskapi.

Fiskavirking kann gerast ein enn sterkari og meira vælrikin fyritøka, sum eisini dregur restina av fiskivinnuni við sær. Eg trúgvi, at tann samlaða føroyska fiskivinnan er inni í eini gongd, sum ger, at man fær eitt styrkt kappingarføri.

– Men tað almenna sær møguleika at fáa nakrar pengar í kassan verður Fiskavirking selt?

– Eg haldi at hatta er eitt misskilt orðaskifti. Framtaksgrunnurin er ein vinnurekandi grunnur. Tað, sum landskassin hevur til góðar hjá grunninum, er 93 mill. kr. í einum láni. Um løgmaður sigur at hann vil hava pengarnar fyri Fiskavirking í kassan, so veit eg ikki hvønn tíðarkarm hann hugsar um. Tað eru teir einastu pengarnir, sum kunnu førast aftur til landkassan. Hinir pengarnir eru endaliga givnir til ein vinnurekandi grunn og kunnu ikki førast aftur til landskassan. Tí er spurningurin, tá tú selur Fiskavirking, at tað eru ikki pengar, sum koma í landskassan men sum koma inn í Framtaksgrunnin. Tað eru so pengar, sum hann kann arbeiða víðari við so ella so.

### Útlendskur kapitalur

Ein spurningur, sum stingur seg fram við jøvnum millumbili er í hvønn mun útlendskur kapitalur skal sleppa at keypa seg inn í føroyskt vinnulív. Henda spurningin kennir Sverri Hansen eisini aftur frá síni tíð sum nevndarformaður í Framtaksgrunninum, tá bæði Fiskavirking og Kósavirkið vórðu endurreist við føroyskum kapitali. Tá hevði man føroyskar loysnir, og tað vóru føroyingar, sum vóru við til at mynda ta gongd, sum tá bleiv. – Vit eru partur av einum altjóða samfelag, og tí kann man ikki útiloka útlendskar íleggjarar, men her er eisini talan um allar samfelagsressurirnar, sum man tá keypir ella selur av landinum.

Sverri Hansen ivast ikki í, at tað í oljuvinnuni verður talan um útlendskan kapital men hann loyvir sær at ivast í, um føroyingar eru so fegnir um, at tann útlendski kapitalurin eisini skal vera dominerandi í flotanum og fiskiídnaðinum.

– Men verður Fiskavirking selt, heldur tú so, at útlendingar skulu hava møguleikan at keypa fyritøkuna ella eiga meginpartin í henni?

– Hetta er sjálvandi ein politiskur spurningur. Men vil man hava møguleika fyri at ávirka tí? Selur tú Fiskavirking út úr Framtaksgrunninum á tí fría marknaðinum, so verða tað sjálvandi teir nýggju eigararnir, sum koma at gera tað av. Og so mugu politikararnir taka støðu til, hvat teir vilja. Frá tí tíðini eg sjálvur sat sum stjóri í Framtaksgrunninum sá eg helst, at Fiskavirking var á føroyskum hondum, og tað geri eg framvegis. Fiskavirking er ein so mikið stórur aktørur á føroyska marknaðinum, at skal fyritøkan halda fram sum ein eind, so eigur hon at verða á føroyskum hondum. Sverri Hansen er annars onga løtu í iva um, at tað er rætt – skal Fiskavirking privatiserast – at tað verður selt samlað. Tað er annars Framtaksgrunnurin, sum suverent ger av, um Fiskavirking skal seljast og hvussu. Landsstýrið hevur ikki loyvi at leggja seg út í avgerðir hjá grunninum. Hann kann tó koyra nevndina frá. Tvær ferðir hevur landsstýrið valt ikki at afturvelja nevnd. Annars kann landsstýrið lóggeva á økinum.

Sverri Hansen var nevndarformaður í Framtaksgrunninum frá januar 1995 til desemeber í 98. Tá hann kom inn í grunnin visti hann ikki, at høvuðsuppgávurnar hjá grunninum vórðu at rekonstruera Fiskavirking og Fiskasøluna. Hetta bleiv so arbeiðið og var Sverri Hansen eisini við til at taka avgerðir, sum vórðu ópoppulerar tá.

Sum stjóri í Vestnordengrunninum, ið hevur høvuðsskrivstovu í Reykjavík, roynir Sverri Hansen eisini at fylgja við gongdini í Føroyum. Grunnurin letur sum so eisini nógv lán til føroyskt vinnulív, og tí er tað eisini partur av arbeiðsuppgávuni at fyglja við, hvat hendir í føroyskum vinnulívi. Og tað er sum slíkur eygleiðari, at hann eisini ger sær sínar meiningar og metingar um eit nú um Fiskavkirking, sum einaferð var hansara høvuðsarbeiðsøki. – Latið Fiskavirking frá frið í nøkur ár er hansara greiða boð.

Sverri Hansen hevur útbúgving sum búskaparfrøðingur frá lærda háskúlanum í Århus. Hann kom til Føroya í 1988 og var eitt skifti á Skála Skipasmiðju og var síðani í fleiri fyritøkum fram til 93, tá kreppan var í hæddini. Tá fekk hann starv sum lærari á Handilsskúlanum á Kambsdali. Har var hann í tvey ár til hann tók við sum stjóri í Framtaksgrunninum. 1. februar ár 2000 tók hann við sum stjóri í Vestnorden-grunninum og hevur sitið har síðani. (Lesið samrøðu við Sverra Hansen um arbeiðið í Vestnordengrunninum og hvat hann heldur um føroyskt vinnulív í dag í seinni blað.)



*Sverri Hansen, búskaparfrøðingur: – Fiskavirking kann ikki fáa betri leiðslu og verða betri rikin enn hon er tað í dag. Latið tí fyritøkuna koyra víðari sum er*

Niels Winther Poulsen, nevndarformaður í Framtaksgrunninum:

# -Vit hava ongan skund

FISKAVIRKING
*Edvard Joensen*

– Vit hava ongan skund við at privatisera Fiskavirking, men støðan hjá grunninum er tó púra greið: Fiskavirking skal seljast til hægstbjóðandi sigur formaðurin í Framtaksgrunninum, Niels Winther Poulsen. Hann leggur aftrat, at alt verður selt undir einum. Í løtuni verður bíðað eftir eini frágreiðing um bygnaðin í fiskivinnuni, sum Vinnumálaráðið hevur sett í gongd og sum skuldi vera liðug í november.

Niels Winther Poulsen sigur, at áðrenn Fiskavirking verður selt, so verður sølan fráboðað í góðari tíð. Hvat viðvíkur møguligum útlendskum áhugamálum í eini slíkari sølu so vísir nevndarformaðurin á, at nevndin hevur bara eitt at halda seg til, og tað er at selja til hægstbjóðandi. Um so er at myndugleikarnir ynskja, at meirilutin av partaeigarunum skulu vera føroyskir, so kann løgtingið bara gera tað við lóg. Kemur slík lóg, so hevur Framtaksgrunnurin eisini at laga seg eftir tí .

Niels Winther Poulsen heldur sjálvur, at tað besta fyri Fiskavirking er, um fyritøkan verður privatiserað, tí harvið fær hon betri arbeiðsfrið.



# Hava illgruna til al-Qaeda

**Yvirgangsfelagsskapurin hjá Osama bin Laden verður settur í samband við ta blóðugu atsóknina á Bali leygarkvøldið**



*Spreingingin var so sterk, at náttklubbin Sari varð javnaður við jørðina*

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Bumbuatsóknin á indonesisku frítíðaroynni Bali leygarkvøldið, sum higartil hevur kravt 190 mannalív, líktist sambært serfrøðingum ikki teimum atsóknum, sum hava verið í Indonesia fyrr.

Fleiri keldur vilja vera við, at tað var ein bólkur hjá yvirgangsfelagsskapinum al-Qaeda, sum skipaði fyri atsóknini. Víst verður á, at amerikanska fregnartænastan CIA fleiri ferðir hevur ávarað indonesisku myndugleikarnar um, at al-Qaeda var í ferð við at fyrireika eina blóðuga atsókn.

Harafturat er alment kent, at myndugleikarnir í Malaysia, Singapore og á Filipsoyggjunum hava tikið fleiri indonesar seinastu mánaðarnar, tí illgruni er um, at teir hava havt samband við felagsskapin hjá bin Laden. Nógv bendir á, at teir indonesisku myndugleikarnir hava ikki tikið amerikansku ávaringarnar í nóg stórum álvara. Fyrr enn nú.

Síðani einaræðisharrin Suharto fall í 1998, eru ávísar demokratiskar settar í verk í Indonesia, men myndugleikarnir í Jakarta hava kortini víst lítlan áhuga í at skipa eitt veruligt demokrati. Fleiri serfrøðingar í indonesiskum viðurskiftum siga, at júst hetta hevur verið ein orsøk til, at fleiri víðgongdir bólkar hava sæð dagsins ljós seinastu árini, og harðskapur og yvirgangur hevur eisini støðugt vundið upp á hesi í hesum sama tíðarskeiðinum, siga teir.

### Høvuðsstøð hjá al-Qaeda

Men flestu serfrøðingarnir eru eisini á einum máli um, at bumbuatsóknin á Bali líkist ikki teimum atsóknunum, sum indonesiskir felagsskapir hava skipað fyri. Tað, sum hendi leygarkvøldið, var eitt annað slag av yvirgangi, og tí bendir alt á, at tað var onkur uttan fyri Indonesia, sum legði atsóknina til rættis, siga serfrøðingarnir.

Amerikanska fregnartænastan CIA segði í einari frágreiðing fyri stuttum, at tekin er um, at nógvir limir í al-Qaeda hava leitað sær til Indonesia, og at landið skjótt kann gerast høvuðsstøð hjá felagsskapinum.

Útlendskir diplomatar í Jakarta siga, at teir indonesisku yvirgangsfelagsskapirnir eru vorðnir meiri harðrendir í seinastuni, og í hesum sama tíðarskeiði eru teir indonesar, sum bardust við al-Qaeda í Afghanistan, komnir heimaftur.

### Illgruni um prest

Avstralsku myndugleikarnir hava illgruna um, at tað var tann hernaðarligi islamski felagsskapurin Jemaah Islamiyah, sum skipaði fyri bumbuatsóknini á Bali. Hesin felagsskapurin er fleiri ferðir settur í samband við al-Qaeda, og hóast altjóða samfelagið leingi hevur lagt trýst á indonesisku myndugleikarnar fyri at fáa teir at handtaka leiðaran í felagsskapinum, er hann ikki tikin.

Myndugleikarnir í Avstralia, Singapore og Malaysia hava í seinastuni ávarað um, at Jemahh Islamiyah fyrireikaði eina blóðuga atsókn. Tey trý londini vilja vera við, at presturin Abubakar Ba'asyr stendur á odda fyri hesum felagsskapinum, men í Indonesia siga myndugleikarnir, at teir hava eingi prógv ímóti honum.

# Næstan 300 danir á Bali

**Í gjár varð framvegis leitað eftir trimum donskum kvinnum, sum ikki vóru komnar afturíaftur aftan á bumbuspreingingina**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*

Danska uttanríkisráðið boðaði sunnudagin frá, at tríggjar danskar kvinnur í aldrinum 18 til 21 ár vóru ikki komnar afturíaftur aftan á ta ógvusligu bumbuspreingingina á Bali. Tær tríggjar vóru á einum skúlaskeiði.

Danska sendistovan í Jakarta hevur sagt, at sjey ella átta danskir ríkisborgarar vórðu lagdir á sjúkrahús, men at eingin teirra hevði fingið álvarsligan skaða.

Næstan 300 danir vóru staddir á Bali um vikuskiftið, men eftir boðum frá uttanríkisráðnum í Keypmannahavn vórðu teir fluttir til Thailands í gjár.

Tveir sviar doyðu í bumbuatsóknini. Tríggjar norskar gentur vóru á diskotekinum, sum varð sprongt í luftina, men tær sluppu óskalaðar frá atsóknini.

## Nyttuleyst val

Veljararnir í Serbia fáa rættiliga góða venjing í hesum tíðum. Herfyri skuldu teir velja nýggjan forseta, men tá einki valevni fekk meiri enn 50 prosent av atkvøðunum, skuldi umval til. Tað var um vikuskiftið, men hóast annað valevnið nú fekk nógv meiri enn helmingin av atkvøðunum, hjálpti tað ikki. Tí nú var minni enn helmingurin av veljarunum á vali, og tað ber ikki til.

Serbiska vallógin sigur, at minst 50 prosent av veljarunum skulu atkvøða, fyri at valið kann verða góðkent. Tá uppteljingin var liðug, høvdu bert góð 45 prosent verið og valt, og tískil er valið ógildað. Annars vann tann hóvligi Vojislav Kostunica seinna valumfarið. Hann fekk sambært valnevndini umleið 67 prosent av atkvøðunum.

Nú noyðast serbisku politikararnir og veljararnir at brynja seg til eitt nýtt valstríð, tí sambært vallógini verður nú byrjað av nýggjum.

## Ósamdir mótstøðumenn

Í dag er forsetaval í Irak, og sum vant verður roknað við, at Saddam Hussein fer at fáa meiri enn 99 prosent av atkvøðunum.

Men samstundis eru iraksku andstøðuleiðararnir, sum búgva í útlegd, farnir at keglast. Hvítu Húsini í Washington hava sagt, at tey eru til reiðar at tingast við seks útlagnar irakskar andstøðubólkar, og ætlanin var, at umboð fyri hesar felagsskapirnar skuldu halda ein fund í Amsterdam í síðsta mánað. Men fundurin varð av ongum, og nú er fráboðað, at umboðini fara at royna at hittast í Bruxelles seinni í hesum mánaðinum.

Amerikanarar hava serliga hug at samstarva við felagsskapinum INA og leiðara hansara, Ayad Allawi, sum fyrr var limur í Bath-flokkinum hjá Saddam Hussein, men trupulleikin er, at leiðslan í einum av hinum andstøðufelagsskapunum vil ikki síggja Ayad Allawi.

Einstakir amerikanskir politikarar og heryvirmenn hava ávarað Bushstjórnina ímóti at líta á teir iraksku andstøðufelagsskapirnar.

## Silvia fekk bumbuhóttan

Ein flogfar hjá svenska flogvápninum noyddist seinasta fríggjadag til Sankta Pætursborg eftir Silviu drotning.

Drotningin skuldi upprunaliga fara til Stockholm við einum flogfari hjá SAS, men fekk boð um at setast aftur, eftir at flogfelagið fekk eitt teldubræv, sum boðaði frá, at fleiri flogfør hjá felagnum fóru at verða sprongd í luftina, rindaði felagið ikki 15 milliónir krónur.

Hóast svensku myndugleikarnir ikki tóku hóttanina í fullum álvara, varð avgjørt at senda eitt hernaðarflogfar til Russlands eftir drotningini.

## Alive - 30 ár seinni

Mong munnu hava sæð amerikanska filmin »Alive« um tað uruguayanska rugbyliðið, sum var í einum flogfari, sum datt niður í Andesfjøllini tann 13. oktober í 1972. 45 fólk vóru í flogfarinum, men tveir mánaðir aftan á vanlukkuna vórðu 16 teirra funnin aftur á lívi.

Tá tey neyðstøddu ferðafólkini ongan mat høvdu eftir, hildu tey seg ikki hava annað í at velja enn at eta sínar deyðu felagar. Á tann hátt eydnaðist teimum at halda sær á lívi í tí nógva kuldanum høgt uppi í fjøllunum.

Á 30 ára degnum fyri vanlukkuna vóru fleiri av teimum 16 komin saman nærhendis staðnum, har flogfar teirra datt niður. Ein teirra greiddi frá, at teir báðir mánaðirnir uppi í Andesfjøllunum høvdu lært seg, at ein eigur ikki at stúra fyri deyðanum, men liva lívið til fulnar.